## Livandi skjøldur fáa bót

Fleiri amerikanarar, sum fóru til Irak at virka sum livandi skjøldur, hava fingið bót, eftir at tey eru komin heimaftur.

Blaðið Sarasota Herald Tribune skrivar, at sambært myndugleikunum hava tey, sum fóru til Irak at virka sum livandi skjøldur ímóti amerikonsku bumbuálopunum, brotið amerikonsku tiltøkini ímóti Irak. Umleið 300 útlendingar fóru til Irak undan krígnum at virka sum livandi skjøldur, og av teimum vóru einir tjúgu amerikanarar. Nøkur teirra hava nú fingið 10.000 dollarar í bót.

Men øll ætla sær ikki at gjalda. Tann 62 ára gamla Faith Fippinger sigur við Sarasota Herald Tribune, at hon ætlar sær ikki at gjalda bótina, sjálvt um tað kann hava við sær, at hon má í fongsul. Hon hevur skrivað fíggjarmálaráðnum í Washington bræv, har hon ger vart við, at hon ætlar sær ikki at vera við til at fíggja útreiðslurnar av, at stjórnin heldur fram við at útbyggja amerikonsku vápnagoymslurnar.

## Naziklæði tikin aftur

Ein klædnaverksmiðja í Hongkong gjørdi herfyri av at seta tey gomlu nazieyðkennini á nøkur av sínum pløggum, men nú hevur verksmiðjan gjørt av at taka eyðkennini avaftur aftan á fleiri mótmæli.

Gloria Yu, sum er talskvinna hjá verksmiðjuni, sigur, at tað var eitt mistak, tá tey gjørdu av at seta nazitekin á summi pløgg, og at tey tí hava gjørt av at taka tey avaftur. Hon hevur samstundis biðið almenningin um umbering fyri mistakið.

Umframt at seta nazitekin á pløggini nýtti verksmiðjan eisini fløgg og annað við nazistiskum eyðkennum uttan fyri verksmiðjubygningin í Hongkong. Eisini tað fall mongum fyri bróstið, og aftan á eitt formligt mótmæli frá ísraelska konsulátinum í Hongkong eru fløggini nú tikin niður.

## Pína fangar

Fimm bretar, sum herfyri sluppu leysir úr einum fongsli í Saudiarabia, siga, at teir vóru fyri grovum sálarligum og likamligum ágangi, meðan teir sótu í fongslinum. Ein teirra vil vera við, at hann varð píndur alla tíðina.

Teir fimm bretarnir og ein kanadiumaður vórðu funnir sekir í at hava verið uppi í bumbuatsóknum í Saudiarabia í 2000 og í 2001. Seinasta fríggjadag sluppu teir leysir, og síðani hava teir funnist hvassliga at saudiarabiska fongsulsverkinum.

Ein av bretunum, Alexander Mitchell, sigur, at hann og hinir vórðu píndir, til teir noyddust at viðganga seg sekar, sjálvt um teir vóru førir fyri at prógva, at teir vóru ósekir. Bretsku myndugleikarnir hava leingi roynt at fáa teir fimm bretarnar leysar, og mannarættindafelagsskapir hava sagt seg vera vísar í, at menninir blivu píndir í saudiarabiska fongslinum, tí sambært felagsskapunum er píning rættiliga vanlig har.

## Fleiri túsund uppsagnir

Tað gongst framvegis illa hjá skandinaviska flogfelagnum SAS at fáa flogið aftur aftan á kreppuna í flogferðsluni.

Mánakvøldið boðaði leiðslan í SAS frá, at tey bæði dótturfeløgini hjá felagnum, Braathens og Widerøe, skulu spara 900 milliónir svenskar krónur innan árslok 2004, og sambært varastjóranum, Gunnar Reiten, fer tað at hava við sær, at fleiri hundrað starvsfólk verða søgd úr starvi.

Samstundis hevur leiðslan í SAS boðað frá, at tey bæði næstu árini skulu rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum skerjast millum 13 og 14 milliardir svenskar krónur. Á tíðindafundi í Stockholm varð boðað frá, at 6.000 starvsfólk fara úr felagnum. Av teimum eru tey fyrstu 1.500 longu farin.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Bush heldur seg burtur frá Arnold Schwarzenegger

**George W. Bush, forseti, vitjar í Kalifornia í vikuni, men hann fer at halda seg langt burtur frá floksfelaganum Arnold Schwarzenegger, sum roynir at gerast guvernørur**

USA
*Árni Joensen:*



*Arnold Schwarzenegger er væl umtóktur í Kalifornia, men Bush, forseti ger skilabest í at halda seg langt burtur frá honum, siga politiskir eygleiðarar í USA*

Í Kalifornia tykjast fleiri og fleiri veljarar hava hug at atkvøða fyri Arnold Schwarzenegger á guvernørvalinum, men verða kalifornisku veljararnir spurdir, hvat teir halda um forsetan, er úrslitið tað øvugta.

Eftir teirri seinastu kanningini halda 49 prosent av kalifornisku veljarunum, at Bush ger eitt rímiliga gott arbeiði sum forseti, men tað er lítið aftur ímóti einari kanning á heysti í 2001, tá heili 73 prosent søgdu tað sama.

Nú forsetin vitjar Kalifornia, hava politiskir eygleiðarar spurt, um hann man ætla sær at hitta guvernørvalevnið Arnold Schwarzenegger, sum stillar upp fyri republikanararnar og sostatt er floksfelagi forsetans. Men flestu eygleiðararnir eru á einum máli um, at Bush fer at halda seg langt burtur frá Arnold.

Teir vísa á, at hóast Arnold Schwarzenegger er væl umtóktur í Kalifornia, hevur hann ongar politiskar royndir, og at nógvir amerikanarar halda lítið um, at ein filmsleikari skal vera best umtókta valevnið í einum so týðandi stati. Tí kann tað skaða umdømið og undirtøku forsetans, gevur hann seg í hóslag við Schwarzenegger.

Rætt er tað, at filmsleikarin stuðlaði George Bush, eldra upp undir forsetavalið í 1988, men síðani hevur sagt ymiskt politiskt, sum ikki hóvar Bush ella teimum flestu republikanarunum. Eitt nú er hann talsmaður fyri eini meiri frælslyntari fosturtøkulóg og strangari vápnaeftirliti, eins og hann hevur talað fyri rættindunum hjá samkyndum. Mál, sum tann erkakonservativi vongurin í republikanska flokkinum als ikki tekur undir við honum í.

Tí er skilabest hjá Bush at halda seg langt burtur frá Arnold.

# Djevulsins generalur tók við

**Charles Taylor er farin úr Liberia. Til eftirmann tilnevndi hann Moses Blah, sum gongur undir navninum »Djevulsins generalur«**

LIBERIA
*Árni Joensen:*

Í Liberia dansaðu fólk í gøtunum, tá tey í sjónvarpinum sóu Charles Taylor, forseta fara umborð á eitt flogfar, sum flutti hann til Nigeria, sum hevur veitt honum friðskjól, hóast hann er skuldsettur fyri krígsbrotsverk.

Men fólk í Liberia skulu ikki vænta sær nakra stórvegis broyting, skrivar týska blaðið Der SWpiegel. Blaðið vísir á, at eftirmaður Taylors, varaforsetin Moses Blah, sanniliga heldur ikki er av Guðs bestu børnum, og at hann dagliga verður umrøddur sum »Djevulsins generalur«.

Stephen Ellis, sum er serkønur í liberiskum viðurskiftum, sigur við Der Spiegel, at tann 56 ára gamli Moses Blah er ikki tann rætti maðurin til at fáa frið í tí borgarakrígsherjaða landinum. Hann vísir á, at Charles Taylor og Moses Blah hava verið samdir í einum og øllum í mong ár, og at bara tað tætta sambandið teirra millum er nóg mikið til at forða fyri, at tann nýggi forsetin kann geva liberiska fólkinum frið.



# ítróttur

Nr. 138 • hósdagur • 24. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



**Landsliðshópurin:**

Jákup Mikkelsen, **Partick Thistle**
Jens Martin Knudsen, **NSÍ**
Óli Johannesen, **TB**
Jóhannis Joensen, **FS Vágar**
Jón Rói Jacobsen, **Brøndby**
Hans Fróði Hansen, **B68**
Pól Thorsteinsson, **B36**
Atli Danielsen, **KÍ**
Súni Olsen, **GÍ**
Tór–Ingar Akselsen, **HB**
Julian Johnsson, **ÍA Akranes**
Jann Ingi Petersen, **B68**
Rógvi Jacobsen, **HB**
Hjalgrím Elttør, **KÍ**
Helgi L. Petersen, **NSÍ**
Christian Høgni Jacobsen, **Vejle**
Andrew av Fløtum, **HB**
John Petersen, **B36**



*– Eg visti av ongum, tá ið eg kom til venjingar mánakvøldið. Tá segði venjarin mær, at eg fór at fáa landsliðsboð, sigur Tór-Ingar Akselsen um úttøkuna til landsliðið. Her er hann í dysti ímóti VB í Gundadali*

*Savnsmynd*

# Tór-Ingar varð heilt kløkkur

**Einasti spælarin í átjan manna landsliðnum, sum ikki hevur spælt landsdystir, hevði onga hóming av, at boð hesa ferð fóru at verða eftir honum**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjár varð greitt, hvørjir átjan spælarar skulu til arbeiðis hjá Fótbóltssambandinum mánamorgunin klokkan tíggju. Tá verður farið undir síðstu fyrireikingarnar til EM undankappingardystin, sum verður ímóti Íslandi mikukvøldið 20. august.

Í gjár roknaðu vit við, at Hans Fróði Hansen fór at verða endurvaldur, eftir at hann varð settur uttanfyri ímóti Íslandi og Týsklandi. Vit dittaðu okkum eisini at siga, at kanska fóru boð at vera send eftir Tór–Ingar Akselsen úr HB, sum hevur verið sannførandi í høgra borði á oddaliðnum síðsta mánaðin og tískil eigur at vera gott boð uppá avloysara fyri leikbannaða Jákup á Borg. At redaktiónin rættuliga spískaði okkara metingar við at seta tær á matarseðilin, er nakað heilt annað.

Hans Fróði Hansen fekk landsliðsboð í gjár, og tað fekk Tór–Ingar Akselsen eisini. Í gjár segði Hans Fróði Hansen her í blaðnum, at um hann ikki fekk boð hesa ferð, so fór at vera torført hjá honum at spæla seg aftur í hitan. Tór–Ingar Akselsen hevur ikki gingið við dreymum um, at tað hesa ferð fóru at vera boð eftir honum.

– Eg visti av ongum, tá ið eg kom til venjingar mánakvøldið. Tá segði venjarin mær, at eg fór at fáa landsliðsboð, og í morgun havi eg fingið brævið frá Fótbóltssambandinum, sum sigur, at eg skal møta mánadagin. Tað er sera hugaligt, sigur Tór–Ingar Akselsen. Hann er sandavágsmaður, og hann býr og arbeiðir har vesturi. Hvørt venjingarkvøld fer hann gjøgnum undirsjóartunnulin og so vestur aftur.

Men tað hevur gingið væl seinastu tíðina?

– Tað hevur gingið væl hjá HB í ár. Vit hava verið fleiri, sum hava kappast um plássini, so fram til summarsteðgin í landskappingini var tað eitt sindur inn og út av liðnum hjá mær. Í seinna Europa Cup dystinum var eg ímillum teir fyrstu ellivu, og síðani havi eg spælt alla tíðina.

Tór–Ingar hevur tvey ára sáttmála við HB. Sáttmálaskeiðið verður liðugt í heyst, men vágamaðurin í HB hevur ikki tikið støðu til, hvussu tað verður við fótbóltsframtíðini hjá honum. Tað er eingin loyna, at teir í FS Vágum fegnir høvdu viljað havt hann vestur aftur at spæla fótbólt, og møguleikin er upplagdur nú, hann býr og arbeiðir har vesturi

– Eg havi ikki hugsað so nógv um hetta enn. Tað er ikki bara upp til mín at gera av. Tað valdast eisini um, hvat feløgini ætla sær, sigur nýggi landsliðsmaðurin hjá HB.

At boð eru eftir Tór–Ingar Akselsen til landsliðsfótbólt er ikki heilt nýtt, hóast hann ikki enn er skrásettur at hava spælt nakran A landsdyst. Fyri tveimum árum síðani hevði Allan Simonsen hann við á venjingarleguni í Spania. Ta ferðina spældi Tór–Ingar við í venjingardysti ímóti donskum 1. deildarfelag. Eisini hevur hann verið á øllum unglingalandsliðunum.

– Eg havi spælt á U–15, U–17 og U–19 landsliðunum, og har havi eg havt Jógvan Martin Olsen til venjara, minnist Tór–Ingar Akselsen, sum er 22 ára gamal, aftur á.

### Broytingarnar

Teir átjan, sum í gjár fingu boð um landsliðsúttøku, eru hesir: Jákup Mikkelsen, Partick Thistle, Jens Martin Knudsen, NSÍ, Óli Johannesen, TB, Jóhannis Joensen, FS Vágar, Jón Rói Jacobsen, Brøndby, Hans Fróði Hansen, B68, Pól Thorsteinsson, B36, Atli Danielsen, KÍ, Súni Olsen, GÍ, Tór–Ingar Akselsen, HB, Julian Johnsson, ÍA Akranes, Jann Ingi Petersen, B68, Rógvi Jacobsen, HB, Hjalgrím Elttør, KÍ, Helgi L. Petersen, NSÍ, Christian Høgni Jacobsen, Vejle, Andrew av Fløtum, HB og John Petersen, B36.

Sammett við ferðina til Íslands og heimadystin ímóti Týsklandi fyri hálvum triðja mánað síðani eru fimm spælarar ikki við hesa ferð. Teir eru Jákup á Borg og Fróði Benjaminsen, sum eru leikbannaðir, og Johan B. Hansen, Heðin á Lakjuni og Jónhard Frederiksberg, sum ikki eru afturvaldir. Nýggju spælararnir eru Tór–Ingar Akselsen, Hans Fróði Hansen og Helgi L. Petersen. Fyrr í summar vóru tjúgu spælarar í ferðalagnum. Nú eru teir átjan.

Ein stórur spurningur er, hvussu tað verður við Óla Johannesen. Liðformaðurin og metmaðurin á landsliðnum spælir nú við TB í 2. deild. Har fær hann neyvan dystarvenjingina, sum venjarin metir vera neyðuga fyri at spæla á landsliðnum. 31 ára gamli Óli Johannesen hevur áður spælt í 2. deild samstundis, sum hann hevur staðið seg væl á landsliðnum. Tað ber ikki til at seta ein so royndan spælara uttanfyri, men tað er einki at ivast í, at venjararnir fara undir venjingunum mánadagin og týsdagin at hava serliga vakið eyga við, hvussu verjuálitið higartil er fyri at spæla.